# Frágreiðing um ársroknskapirnar hjá kommununum fyri 2015

Sambært kommunustýrislógini skulu kommunustýrini hava samtykt og sent landsstýrinum ársroknskapin fyri undanfarna árið innan 1. juni. Fíggjarmálaráðið hevur samantalt ársroknskapirnar fyri 2015[1], og verður her tikið samanum fíggjarligu heildargongdina hjá føroysku kommununum í árinum. Fíggjarmálaráðið hevur í hesum sambandi ikki gjøgnumgingið einstøku roknskapirnar í mun til játtanareftirlit ella í mun til lógarkrøv annars, men eru tølini niðanfyri tikin beint úr ársroknskapunum.

Í talvuni niðanfyri sæst samantalt úrslit fyri føroysku kommunurnar:

***Ársroknskapur 2014 og 2015 umframt fíggjarætlan 2016 samantalt fyri allar føroyskar kommunur***

| | (tús. Kr.) | **2014** | **2015** | *%-broyting* | **2016FÆ** | *%-broyting* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1-7 | Rakstur, netto | 1.137.431 | 1.579.019 | *(+38,8%)* | 1.631.066 | *(+3,3%)* |
| | Løgur, netto | 376.196 | 383.793 | *(+2,0%)* | 591.301 | *(+54,1%)* |
| **§ 1-7** | **Tilsamans** | **1.513.627** | **1.962.812** | ***(+29,7%)*** | **2.222.367** | ***(+13,2%)*** |
| § 20 | Rentur, netto | 40.254 | 33.095 | *(-17,8%)* | 36.412 | *(+10,0%)* |
| | Skattur v.m. | 1.621.225 | 2.155.072 | *(+32,9%)* | 2.040.552 | *(-5,3%)* |
| **§ 20** | **Tilsamans** | **1.580.971** | **2.121.977** | ***(+34,2%)*** | **2.004.140** | ***(-5,6%)*** |
| | **RLÚ-úrslit** | **67.344** | **159.165** | ***(+136,3%)*** | **-218.227** | ***(-237,1%)*** |

*Viðm.: "Rakstur, netto" er rakstrarinntøkur minus rakstrarútreiðslur. Samsvarandi er við "Løgur, netto" og "Rentur, netto". "Skattur v.m." eru øll sløg av skatti minus rentustuðul.*

Til samanberingar eru í talvuni eisini sett samantald roknskapartøl fyri 2014 og fíggjarætlanartøl fyri 2016,[2] umframt prosentbroytingar í mun til árið frammanundan. Í mun til roknskapin fyri 2014 sæst, at rakstrarútreiðslurnar eru øktar munandi í 2015. Eisini sæst, at inntøkur frá skatti v.m. eru nógv øktar. Í báðum førum hevur hetta í størstan mun samband við, at kommunurnar frá 1. januar 2015 yvirtóku raksturin av heimatænastu og eldrarøkt.

Samanlagt høvdu kommunurnar avlop á 159 mió. kr. í 2015, ið er munandi størri enn avlopið í 2014 á 67 mió. kr.

Í fíggjarætlanunum fyri 2015 varð samanlagt roknað við halli á 77 mió. kr. Tað vil við øðrum orðum siga, at staðfesta úrslitið hjá kommunala geiranum gjørdist 236 mió. kr. betri enn upprunaliga væntað. Høvuðsorsøkin til hetta var, at samlaðu inntøkurnar av skattum v.m. vóru 263 mió. kr. meir enn væntað. Roknað varð við inntøkum frá skatti v.m. fyri slakar 1,9 mia. kr., meðan staðfestu inntøkurnar vóru slakar 2,2 mia. kr.

Ein samanteljing av fíggjarætlanunum fyri 2016 vísir, at roknað verður við einum halli á 218 mió. kr. fyri 2016. – Tað vil siga, at ætlaða úrslitið fyri 2016 er heilar 377 mió. kr. verri enn staðfesta úrslitið fyri 2015. Her kann tó verða lagt merki til, at roknað verður við næstan 120 mió. kr. minni í inntøkum og meir enn 200 mió. kr. meir í løguútreiðslum.

[1] Eingi tøl eru tøk fyri Húsavíkar kommunu og eru tey tí ikki við í samanteljingini

[2] Fíggjarætlanartølini eru uttan eykajáttanir.

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Kommunala skuldin**
Talvan niðanfyri vísir, at eins og undanfarin ár er nettoskuldin serliga savnað hjá teimum miðalstóru kommununum.

**Skuld við ársenda 2015**

| | Skuld | | | Nettoskuld |
|---|---|---|---|---|
| *(tús. kr.)* | Brutto | Netto | Íbúgvar | per íbúgva |
| Tórshavnar kommuna | 188.261 | -176.340 | 20.521 | -8,6 |
| *excl. Tórshavnar havn* | *181.389* | *-38.719* | *20.521* | *-1,9* |
| Kommunur yvir 450 íbúgvar annars | 807.410 | 474.407 | 25.885 | 18,3 |
| Kommunur undir 450 íbúgvar | 50.425 | 12.978 | 2.575 | 5,0 |
| **Allar kommunur** | **1.046.096** | **311.045** | **48.981** | **6,4** |

Við ársenda 2015 var samlaða nettoskuldin hjá føroysku kommununum góðar 311 mió. kr. Til samanberingar var nettoskuldin við ársenda 2014 slakar 467 mió. kr. og við ársenda 2013 slakar 535 mió. kr. Seinastu tvey árini er samlaða nettoskuldin hjá kommununum sostatt minkað við umleið 225 mió. kr.

Bruttoskuldin hjá kommununum var 1,05 mia. kr. við ársenda 2015. Hetta er á sama støði sum árið fyri.

**Hallini**
Størstu hallini í 2015 vóru hjá hesum kommunum:

| *(tús. kr.)* | RLÚ-úrslit (hall) | *Løgur í árinum* | Bruttoskuld við ársenda | Nettoskuld við ársenda | Nettoskuld per íbúgva |
|---|---|---|---|---|---|
| Runavíkar kommuna | -15.382 | *54.712* | 154.345 | 128.785 | 32,9 |
| Sunda kommuna | -811 | *25.739* | 29.249 | 13.199 | 7,8 |
| Fámjins kommuna | -312 | *544* | 1.552 | 1.307 | 15,0 |

*viðm.: Tøl sambært innkomnum roknskapum*

Kommunurnar í talvuni eru samstundis einastu kommunur, ið høvdu hall í 2015. Hjá Runavíkar kommunu og Sunda kommunu stavar hallið í stóran mun frá løguútreiðslum í sambandi við broytt ognarviðurskifti á ávikavist eldraøkinum og skúlaøkinum.

**Avlopini**
Størstu avlopini í 2015 vóru hjá hesum kommunum:

| *(tús. kr.)* | RLÚ-úrslit (avlop) | *Løgur í árinum* | Bruttoskuld við ársenda | Nettoskuld við ársenda | Nettoskuld per íbúgva |
|---|---|---|---|---|---|
| Klaksvíkar kommuna | 26.666 | *35.868* | 153.479 | 80.842 | 16,3 |
| Tórshavnar kommuna | 23.959 | *198.638* | 188.261 | -176.340 | -8,6 |
| Eysturkommuna | 22.713 | *8.566* | 41.702 | 6.642 | 3,3 |
| Tvøroyrar kommuna | 16.056 | *1.917* | 71.612 | 45.212 | 26,7 |
| Eiðis kommuna | 15.370 | *-5.542* | 13.185 | -3.075 | -4,5 |

*viðm.: Tøl sambært innkomnum roknskapum*

Tórshavnar kommuna og Klaksvíkar kommuna, sum eru tær størstu kommunurnar í landinum, høvdu eisini tey størstu avlopini. At hesar báðar kommunurnar hava góð fíggjarlig úrslit hevur sjálvandi stóra ávirkan á úrslitið hjá samlaða geiranum. Avlopið hjá Eiðis kommunu stavar í stóran mun frá søluni av ognarlutinum, ið Eiðis kommuna átti í Felagsskúlanum á Oyrabakka. Við

í góða úrslitinum hjá Eysturkommunu er eisini sølan av ognarlutinum í Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi.

**Eingin kommuna við nettoskuld størri enn eina álíkning**
Við árslok 2015 var eingin kommuna, ið hevði nettoskuld størri enn eina skattaálíkning á 23 prosent.

Talvan niðanfyri vísir eitt samlað yvirlit yvir nøkur høvuðstøl frá roknskapunum fyri 2015. Har sæst m.a., at kommunurnar, sum við árslok 2015 høvdu størst skuld í mun til eina álíkning á 23 prosent, vóru Runavíkar kommuna, Vága kommuna, Skopunar kommuna og Vágs kommuna. Hesar høvdu allar nettoskuld, ið svaraði til meir enn 80 prosent av einari álíkning.

Kommunurnar við størst nettoogn í mun til eina álíkning vóru Fugloyar kommuna, Skúvoyar kommuna og Húsa kommuna. Hesar høvdu allar nettoogn, ið svaraði til meir enn eina álíkning. Talan er tó ikki um stórar upphæddir í samlaða høpinum, tí samanlagt er nettoognin hjá hesum trimum kommunum umleið 12 mió. kr.

| Kommununavn | Fólkatal 31/12 | Kommunu-skattaprosent | Rakstur | Løgur | Rentur | Skattur v.m. | RLÚ-úrslit | Bruttoskuld, ultimo | Nettoskuld, ultimo | Nettoskuld / 23%-álíkning | Nettoskuld per íbúgva (tkr) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Runavíkar | 3.911 | 22,00% | 130.888 | 54.712 | 6.743 | -176.961 | -15.382 | 154.345 | 128.785 | 0,94 | 33 |
| Vága | 1.991 | 23,00% | 68.534 | 8.017 | 1.829 | -86.120 | 7.740 | 78.251 | 54.481 | 0,82 | 27 |
| Skopunar | 444 | 23,50% | 14.036 | 57 | 651 | -19.043 | 4.299 | 12.932 | 10.781 | 0,81 | 24 |
| Vágs | 1.330 | 22,95% | 42.618 | 5.689 | 519 | -55.100 | 6.274 | 41.557 | 32.985 | 0,81 | 25 |
| Tvøroyrar | 1.693 | 23,50% | 55.892 | 1.917 | 1.723 | -75.588 | 16.056 | 71.612 | 45.212 | 0,77 | 27 |
| Skálavíkar | 132 | 22,00% | 5.860 | 771 | 119 | -6.994 | 244 | 4.537 | 2.875 | 0,71 | 22 |
| Nes | 1.237 | 20,50% | 38.773 | 1.211 | 821 | -47.315 | 6.510 | 34.920 | 23.078 | 0,57 | 19 |
| Vestmanna | 1.212 | 22,00% | 41.183 | 6.508 | 968 | -56.440 | 7.781 | 34.158 | 24.290 | 0,56 | 20 |
| Porkeris | 308 | 21,00% | 11.516 | 511 | 70 | -12.475 | 378 | 6.909 | 5.350 | 0,55 | 17 |
| Viðareiðis | 355 | 22,00% | 11.647 | 1.998 | 288 | -14.925 | 992 | 10.149 | 6.286 | 0,53 | 18 |
| Fuglafjarðar | 1.499 | 21,50% | 53.075 | 15.944 | 2.070 | -81.431 | 10.344 | 65.073 | 30.249 | 0,52 | 20 |
| Sjóvar | 947 | 22,50% | 30.829 | 4.509 | 1.429 | -40.897 | 4.127 | 23.595 | 14.708 | 0,47 | 16 |
| Sands | 527 | 23,00% | 16.694 | 526 | 443 | -23.381 | 5.718 | 15.233 | 6.003 | 0,45 | 11 |
| Klaksvíkar | 4.961 | 22,00% | 161.417 | 35.868 | 5.917 | -229.869 | 26.666 | 153.479 | 80.842 | 0,43 | 16 |
| Fámjins | 87 | 19,00% | 3.984 | 544 | 39 | -4.256 | -312 | 1.552 | 1.307 | 0,38 | 15 |
| Sørvágs | 1.113 | 21,70% | 39.333 | 6.137 | 825 | -51.994 | 5.697 | 34.836 | 14.328 | 0,35 | 13 |
| Sunda | 1.688 | 21,50% | 52.299 | 25.739 | 572 | -77.801 | -811 | 29.249 | 13.199 | 0,23 | 8 |
| Sumbiar | 345 | 20,00% | 11.738 | 2.323 | 3 | -14.174 | 110 | 5.106 | 1.980 | 0,19 | 6 |
| Hovs | 110 | 20,00% | 4.108 | 191 | 23 | -4.982 | 661 | 1.737 | 542 | 0,13 | 5 |
| Kvívíkar | 582 | 21,00% | 19.401 | 2.395 | 292 | -26.470 | 4.382 | 12.502 | 2.568 | 0,12 | 4 |
| Eystur | 2.022 | 21,00% | 69.889 | 8.566 | 1.708 | -102.876 | 22.713 | 41.702 | 6.642 | 0,08 | 3 |
| Hvalbiar | 711 | 20,00% | 23.151 | 2.892 | 123 | -28.541 | 2.375 | 3.713 | 112 | 0,00 | 0 |
| Hvannasunds | 398 | 20,25% | 11.676 | 1.719 | 147 | -15.931 | 2.390 | 7.301 | -1.695 | -0,12 | -4 |
| Eiðis | 687 | 20,75% | 17.955 | -5.542 | 330 | -28.112 | 15.370 | 13.185 | -3.075 | -0,13 | -4 |
| Tórshavnar | 20.521 | 20,25% | 633.466 | 198.638 | 5.460 | -861.523 | 23.959 | 188.261 | -176.340 | -0,22 | -9 |
| Kunoyar | 135 | 19,50% | 4.561 | 1.048 | 0 | -6.055 | 445 | 75 | -2.448 | -0,47 | -18 |
| Húsa | 42 | 17,00% | 1.373 | 561 | -1 | -2.024 | 91 | 90 | -2.298 | -1,32 | -55 |
| Skúvoyar | 43 | 16,00% | 1.591 | 57 | -1 | -1.648 | 2 | 4 | -3.142 | -2,00 | -73 |
| Fugloyar | 40 | 16,00% | 1.532 | 287 | -15 | -2.146 | 341 | 33 | -6.560 | -3,03 | -164 |
| Húsavíkar | 117 | 21,00% | | | | | | | | | |
| **30** | **49.188** | **21,16%** | **1.579.019** | **383.793** | **33.095** | **-2.155.072** | **159.160** | **1.046.096** | **311.045** | | **6** |

Rakstur er rakstrarútreiðslur minus rakstrarinntøkur. Tilsvarandi er fyri løgur og rentur. Skattur v.m. er eru øll av skatti minus rentustuðul.